**Fuglafjarðar skúli**
Mirmansvegur 48
FO-530 Fuglafjørður. Føroyar
Tlf. +298 23 80 60. E-mail: fug@skulin.fo

**Lærarastørv í Fuglafjarðar skúla**

Til skúlaárið 2024-2025 eru hesi størv leys at søkja í Fuglafjarðar skúla:

- 2 føst lærarastørv við setan frá 1. august 2024. Setanarbrotið er 1,0.
- 1 barsilstarv fyri lærara frá 14. august til og við 20. desembur 2024. Setanarbrotið er 0,8.
- 3-4 tíðaravmarkað lærarastørv frá 1. august 2024 fyri lærarar í farloyvi, vegna lækkað tímatal, avlopstímar og undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Endaliga tímatalið verður ásett 1. septembur 2024.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava prógv sum lærari, tó kunnu umsøkjarar, sum fáa prógv í summar, søkja á jøvnum føti við tey, sum longu hava lokið prógv.

Til føstu størvini verður søkt eftir lærarum, ið kunnu undirvísa í støddfrøði í øllum deildum, umframt ítrótti, tónleiki, søgu og náttúru- og tøkni í mið- og hádeild.
Til barsilstarvið verður søkt eftir lærara, ið kann undirvísa í føroyskum, náttúru- og tøkni og kristni í grund- og miðdeild.
Til tíðaravmarkaðu størvini er tørvur á lærarum, ið kunnu undirvísa í tónleiki, alis- og evnafrøði, lívfrøði, støddfrøði, náttúru og tøkni, donskum, føroyskum, enskum, handarbeiði, smíð, motorlæru og dansi. Harumframt er tørvur á lærarum, ið kunnu átaka sær flokslæraraleiklut í grund- og miðdeild, kunnu undirvísa í føroyskum sum annaðmál og sum hava førleikar at undirvísa nemingum við serligum tørvi.

Lærarar, ið kunnu undirvísa í tónleiki, føroyskum sum annaðmál og vísindalærugreinum hava fyrimun.

**Vit vænta, at tú**

- ert fyrikomandi og sýnir jaligan hugburð mótvegis næmingum og starvsfeløgum
- dugir at samstarva og vilt vera við til at menna skúlan og teg sjálva/-n
- ert fevnandi og vil styrkja felagsskapin
- ynskir at kveikja hugin til at læra hjá tí einstaka næminginum
- kanst tillaga teg til skiftandi arbeiðsumstøður
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfólk skúlans, tekur lut í dagliga arbeiði skúlans

**Lønar- og setanartreytir:**

Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so er, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan. Størvini eru lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**

Umsóknir við CV, avritum av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 15. juni kl. 14.00. Nærri kunning um størvini fæst við at seta seg í samband við Berlys Toftadal, skúlastjóra, á tlf.nr. 238061 ella á t-post berlys.toftadal@skulin.fo

Setanarsamrøður verða í viku 25. Barnaváttan verður kravd í sambandi við setan.

*Fuglafjarðar skúli hevur inniverandi skúlaár 307 næmingar í 1 .- 10. flokki. Á skúlanum starvast 32 lærarar, 3 námsfrøðiligir stuðlar, 2 skúlaskrivarar, 3 húsavørðir og 5 fólk í reingerðartoyminum. Skúlin leggur dent á at kveikja, virða og menna.*